VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 24.10.2023 kl. 18:00 |
| **Fundarstaður:** | |
| **Málnr.:** | 21/00003 |
| Til staðar: | Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Dagbjørn Hansen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Oddmar Ravnsfjall, Jens Gaardlykke, Jóanis Albert Nielsen, Jóhannus Hansen |
| Varalimir: | Martin Simonsen |
| Ikki til staðar: | Rósa Samuelsen, |
| Aðrir partar: | |
| Fundarskrivari: | Jóhan Hendrik Ellefsen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Kunning** | | | |
| 10/23 | 23/00041-12 | Mál beind í nevnd 9-23 | 3 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 78/23 | 23/00151-9 | Umsókn um byggiloyvi til útbygging av Sóljugarði | 4 |
| 79/23 | 23/00526-1 | Støðutakan til útbjóðing av útbyggingini av Sóljugarði | 5 |
| 80/23 | 23/00376-5 | Umsókn um byggiloyvi til svala á matr. nr. 205 í Miðvági | 6 |
| 81/23 | 23/00544-2 | Fyribils øki til neytaslakt | 7 |
| 82/23 | 23/00425-2 | Umsókn um grundøki | 8 |
| 83/23 | 23/00524-2 | Umsókn um sundurbýti | 9 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 84/23 | 23/00514-2 | Umsókn um eykatímar til kvøldskúlan | 10 |
| 85/23 | 23/00303-1 | EXTRA23_02 Eykaætlan 02 2023 | 11 |
| | | | |


Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

**Kunning**

## 10/23 Mál beind í nevnd 9-23

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 24.10.2023 | 10/23 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 24. oktober 2023:**
Tikið til eftirtektar.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

**Til støðutakan**

## 78/23 Umsókn um byggiloyvi til útbygging av Sóljugarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | | |
| 1 Tekniska nevnd | 12.10.2023 | 64/23 |
| 2 Býráðið | 24.10.2023 | 78/23 |

**Málslýsing:**

Umsitingin hevur arbeitt við eini ætlan um at útbyggja Sóljugarð, fyri at betra um umstøðurnar hjá børnum og starvsfólkum.

Vága Smíð og Sjøtil hava arbeitt við at fyrireika verkætlanina, og nú er klárt at søkja um byggiloyvi.

Søkt verður um at útbyggja tað eystaru lonina norðureftir við umleið 150 $m^2$ og um frávik at byggja nærri grannamark enn 2,5m.
Tekningarnar hava verið til grannahoyring og var ongin viðmerking til ætlanina.

Viðmerking frá umsitingini:
Umsitingin hevur saman við starvsfólkunum á stovninum útarbeitt uppskotið og eru partarnir samdir um at loysnin er góð.

Nevndin verður biðin um at taka støðu til umsóknina, og um loyvi skal gevast til frávik.

**Tekniska nevnd 12. oktober 2023:**

Tekniska nevnd mælur til at geva frávik og byggiloyvi

**Býráðið 24. oktober 2023:**

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 79/23 Støðutakan til útbjóðing av útbygginini av Sóljugarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.10.2023 | 66/23 |
| 2 Býráðið | 24.10.2023 | 79/23 |

**Málslýsing:**

Útbjóðingartilfarið til útbyggingin av Sóljugarði er um at vera klárt.

Viðmerking frá umsitingini:
Tilfarið er gjørt soleiðis at tað kann bjóðast út í høvuðsarbeiðstøku, ið umsitingin metir er rætta loysnin til hesa verkætlanina.

Nevndin verður biðin um at taka støðu til um verkætlanin skal bjóðast út og hvussu verkætlanin verður boðin út.

**Tekniska nevnd 12. oktober 2023:**

Tekniska nevnd mælur til, at arbeiði verður boði út í innbodnari licitatión og høvuðsarbeiðstøku

**Býráðið 24. oktober 2023:**

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 80/23 Umsókn um byggiloyvi til svala á matr. nr. 205 í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.10.2023 | 63/23 |
| 2 Býráðið | 24.10.2023 | 80/23 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr. 205, Tvørgarðsgøta 1 í Miðvági, søkir um byggiloyvi til svala.

Søkt verður um frávik at byggja nærri grannamark enn 2,5m.
Umsóknin hevur verið til hoyring hjá grannanum á matr. nr. 323g, Jatnavegur 3.
Grannin vil ikki ganga umsóknini á møti.

Viðmerking frá umsitingini:
Umsitingin mælur til at geva loyvi til svala, tá tað í størri mun fer at betra um støðuna við 'innkikk' fyri báðar partar.

Nevndin verður biðin um at taka støðu til um byggiloyvi skal vera givið við frávik til at byggja nærri grannamark enn 2,5m.

**Tekniska nevnd 12. oktober 2023:**

Tekniska nevnd mælur frá at geva frávik

**Býráðið 24. oktober 2023:**

Meirilutin sum er Jóanis Albert Nielsen, Jóhannus Hansen, Jónhard Selfoss, Jens Gaardlykke, Ásla Leila Johansen, Tórdis D. Johannesen og Dagbjørn Hansen, taka undir við teknisku nevnd.

Minnilutin, sum er Bjarni Prior, Martin Simonsen, Oddmar Ravnsfjall og Albert Ellefsen taka ikki undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 81/23 Fyribils øki til neytaslakt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 12.10.2023 | 15/23 |
| 2 Býráðið | 24.10.2023 | 81/23 |

**Málslýsing:**

Stuttflutt søkir um fyribilsloyvi, at seta tvær bingjur at brúka til slakt og handil á matr.nr 245b har sum sand og skervsølan heldur til í dag.

Fyribils ætlanin til økir á vinnuøkinum leggur uppfyri, at Stuttflutt fær øki nr.13 sum fyribils øki.

Viðmerking frá umsitingini:

Tað eru ikki lagdar leiðingar til øki, og er hetta neyðugt at gera áðrenn nakað virksemi fer í gongd á økinum. Økini eru ikki matrikkulera og meta vit, at tað er skilabest at hetta verður gjørt áðrenn. Vága Kommuna hevur øki nr.14 tekniski leiðarin metur, at hetta øki hóskar betur til virksemi hjá Stuttflutt, avbjóðingin við økinum nr.12,13,14,15 og 17 er, at tey eru ikki liðug planera og við virksemi á økinum, ger tað at jørðarbeiði kann ávirkast av hesum.

Stuttflutt hevur fingið tillutað øki nr.16 um tað ber til at hava fyribils virksemi hjá stutt flutt á hesum økinum, samtundis sum bygging fer framm, meta vit at hetta er skilabesta staðsetingin

Um loyvi verður givið, mæla vit til, at tað verður gjørd ein reglugerð fyri øki hjá Stuttflutt.

**Vinnu- og havnanevndin 12. oktober 2023:**

Vinnu- og havnanevndin mælur til, at fyribilsloyvi verður givið til slátur á øki 14. Bingjur verða settar á øki 16 og at umsitingin ger reglugerð fyri virksemi hjá Stuttflutt og at fyribilsloyvi verður galdandi í eitt ár.

**Býráðið 24. oktober 2023:**

Einmælt samtykt at taka undir við vinnu- og havnanevndini.

Formansváttan:________

VÁGA KOMMUNA

## 82/23 Umsókn um grundøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 83/23 |
| 2 Býráðið | 24.10.2023 | 82/23 |

**Málslýsing:**

Kirkjuráðið fyri Sandavágs kirkju søkir um grundøki til nýtt kirkjuhús, øki ið spurt verður um er matr.nr 150a

Kirkjuráðið er farið undir fyrireikingar til at byggja kirkjuhús í Sandavági. Ætlandi skal húsið vera so nær kirkjuni, sum gjørligt, tó uttan at vera bygt upp í kirkjuna, ella á nakran hátt at broyta umhvørvið við kirkjuna.

Ynski frá kirkjuráðnum er at sleppa at byggja á økið eystan fyri kirkjuna frá norðastu neystunum við landsynningshornið á kirkjugarðinum, og norðureftir.

Matr.nr 150a liggur í øki E almennir stovnar og er 585m². Tað eru fleiri lutir í matr.nr 150a og mugu hesir sundurbýtast áðrenn eina møguliga sølu.

Fíggjarnevndin verður biðin um at taka støðu til, um kommunan er sinnað at selja umbidnað øki til kirkjuhús.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:**

Viðmælt at selja.

**Býráðið 24. oktober 2023:**

Samtykt at beina málið í mentanar- og trivnaðarnevndina.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 83/23 Umsókn um sundurbýti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.10.2023 | 65/23 |
| 2 Býráðið | 24.10.2023 | 83/23 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent kommununi umsókn, um sundurbýti til samanlegging uttangarðs, millum matr.nr 235a og 18 í Sandavági í til ummælis

Talan er um uttangarðsjørð 9.gl í Oknadali, sum skiftur eigara, og verður flutt til matr.nr. 18 í Sandavági, frá matr.nr 235a.

**Viðm. frá umsitingini:**

Umsitingin mælur til, at játta umsóknini

**Býráðið 24. oktober 2023:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 84/23 Umsókn um eykatímar til kvøldskúlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 09.10.2023 | 54/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 89/23 |
| 3 Býráðið | 24.10.2023 | 84/23 |

**Málslýsing:**

Kvøldskúlin søkir um at fáa eykatímar til skúlan í heyst/vetur.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 09. oktober 2023:**

Mælt verður til ganga umsóknini á møti.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:**

Viðmælt at ganga umsóknini á møti. Útreiðslan verður fíggjað við eykajáttan.

**Býráðið 24. oktober 2023:**

Einmælt samtykt at taka undir við mentanar- og trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 85/23 EXTRA23_02 Eykaætlan 02 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.06.2023 | 54/23 |
| 2 Býráðið | 13.06.2023 | 51/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 91/23 |
| 4 Býráðið | 24.10.2023 | 85/23 |

**Málslýsing:**

**Rakstrarjáttan:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| §1. RS112 | Val | kr. | 75.000,- |
| §1. RS114 | Umsitingin | kr. | 65.000,- |
| §3. RS31010 | Miðgarður | kr. | 250.000,- |
| §4. RS410 | Skúlin á Giljanesi | kr. | 70.000,- |

**Løgujáttan:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| §4. RS41004 | Skúlin á Giljanesi | kr. | 13.200.000,- |
| §6. RS61810 | Byggibúning | kr. | 5.000.000,- |

**Dagført 18.10.2023**

2. viðgerð.

**Fíggjarnevndin 07. juni 2023:**

Viðmælt.

**Býráðið 13. juni 2023:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:**

Formansváttan: ____________

Viðmælt.

**Býráðið 24. oktober 2023:**

Einmælt samtykt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 18:45

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Dagbjørn Hansen

Martin Simonsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Oddmar Ravnsfjall

Jens Gaardlykke

Jóanis Albert Nielsen

Jóhannus Hansen

Formansváttan:______________